**Til øll foreldur at skúlabørnum í Tórshavnar kommunu**

2003-2106/6 - SG 20/02/2012

**Kunningarskriv um tryggingarviðurskifti hjá skúlanæmingum**

Kommunusamskipan Føroya hevur kannað viðurskiftini viðvíkjandi trygging av næmingum og er komin til ta niðurstøðu, at kommunur hava ikki heimild at vanlukkutryggja næmingar.

Ein kommuna kann bert svara fyri skaðar, kommunan sjálv hevur ábyrgd av, og hevur tískil eisini bert heimild til at tekna trygging fyri slíkar skaðar, og sum er, varða kommunurnar bert av tí partinum av skúlaøkinum, sum er bygningar og rakstur av hesum.

Tí kann kommunan hvørki tekna vanlukkutrygging móti fylgjunum av hendiligum óhappum, ið næmingar verða fyri, ella tekna ábyrgdartrygging fyri skaðar, næmingar gera á fólk ella lutir.

*Avleiðingin av hesum er, at tygum sum foreldur hava ábyrgdina av, at barn/børn tygara verða fevnd av tílíkari trygging, um tygum ynskja tað.*

Í skúlum hevur kommunan tó ábyrgdina av bygningum og fysisku karmunum um skúlan.

Fær næmingur skaða, tí at viðurskifti, ið kommunan hevur ábyrgdina av, ikki eru í lagi, kemur kommunan sjálvandi undir endurgjaldsábyrgd, og rindar endurgjald.

Vinaliga

k.v.

Jóan Petur Hentze
trivnaðarstjóri

/

Jákup Simonsen
mentamálaleiðari